Gongur væl hjá ENI at bora:

# Hava borað 1500 metrar – møguligt úrslit á ólavsøku

**Gongur alt sum ætlað og vónað, kann henda, at Føroya fólk fær góð tíðindi um ólavsøkumundið. Men hesi kunnu tó eisini gerast beint øvugt og ikki koma fyrr enn nógv seinni. Vit tosa um 4. brunnin á føroyska landgrunninum, tann, sum italska oljufelagið ENI (fyrr Agip) borar í løtuni**

4. BRUNNURIN
*Jan Müller*



*Eitt av heimsins mest framkomnu boriskipum, Belford Dolphin borar 4. brunnin á landgrunninum*

Sett varð á at bora sunnudagin 15. juni. – Tað hevur gingið væl og eftir ætlan og eru boraðir góðir 1400 metrar, tvs. frá havbotninum sigur Alex Buvik, leiðari á Oljumálaráðnum og hann, sum hevur ábyrgdina mótvegis føroyskum myndugleikum, at alt gongur sum tað eigur við boringini.

Hesir fyrstu 10 dagarnar eru farnir til at tryggja holið á ymsan hátt, soleiðis at restin av boringini kann ganga uttan stórvegis trupulleikar. Ein kann siga, at við hesum partinum av boringini er ta neyðuga og tunga forarbeiðið gjørt, ein kann siga, at hervið er sjálvt fundamentið fyri víðari boriholinum komið uppá pláss. Síðani – tvs. í dag ella hósdagin – verður so farið undir meira miðvísa boring teir 1500 til 2000 metrarnar aftrat niður í dýpið. Endaliga málið er at bora umleið 4250 metrar og tá eru teir umleið 1000 metrarnir frá vatnskorpuni við. Tað fer at taka longri tíð at bora henda partin av brunninum, tí tá skulu takast kjarnuroyndir sohvørt, tey skulu logga oa. Talan er um einar 30 til 40 dagar aftrat.

Sosialurin hevur skilt, at ENI hevur fleiri mál tað fer at kanna ávegis niður eftir móti tí endaliga málinum. Hetta er ikki óvanligt, tí eisini okkurt av hinum oljufeløgunum, sum hevur borað, hevði fleiri mál í teirra brunnum. Alex Buvik sigur seg onga viðmerking hava til slíkar metingar og gitingar.

Uppá fyrispurning nær tey í Oljumálastýrinum so dánt hava eina meting av endaliga boriúrslitinum sigur Alex Buvik, at tað veldst sjálvandi um umstøðurnar, men tað er ikki óhugsandi, at tey hava eina meting um tríggjar til fýra vikur. Oljumálaráðið hevur tryggjað sær í loyvunum, at tað eftir at ein brunnur er liðugt boraður kann fara út við einum tíðindaskrivi um úrslitið. So gongur væl við boringini kann eitt úrslit verða kunngjørt kanska fyri ólavsøku men helst ikki fyrr enn eftir hátíðina.

Annars upplýsir Alex Buvik, at ENI hevur hildið seg til allar tær reglar, sum eru galdandi fyri bæði trygd og umhvørvi. Teir vóru umborð á boriskipinum Belford Dolphin, áðrenn tað fór undir at bora og tryggjaðu sær, at alt var í tráð við føroysku reglurnar.

Sosialurin hevur roynt at fáa eina viðmerking frá ENI, men tað hevur ikki eydnast okkum.

ENI, sum er fyristøðufelag fyri hesi boringini, eigur 75% av loyvinum, meðan Føroya Kolvetni eigur hini 25%.

# Endaði á takinum

**Ein 25 ára gamal maður varð fluttur á Landssjúkrahúsið við brotnum ryggjageislum, tá hann misti tamarhaldið á bilinum á landsvegnum omanfyri Kvívík týskvøldið**

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*





*Ein 25 ára gamal maður breyt tveir ryggjageislar, tá hann misti tamarhaldið á bilinum, sum endaði á takinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Maðurin var einsamallur í bilinum, tá óhappið hendi. Hann var farin úr Vestmanna og koyrdi omanfyri Kvívík, tá hann brádliga misti tamarhaldið á bilinum, sum fyrst brast í bergið vinstrumegin og síðani varð slongdur innaftur á vegin, har hann bóltaði runt.

Maðurin varð beinanvegin fluttur á Landssjúkrahúsið í Havn, og tað vísti seg, at hann hevði brotið tveir ryggjageislar, umframt at hann hevði aðrar smávegis snuddir. Hann er síðani innlagdur til nærri kanningar.

Áðrenn sjúkrabilurin kom á staðið, høvdu fólk hjálpt manninum við fyrstuhjálp. Maðurin misti ongantíð vitið, tá óhappið hendi.

Bilurin er sera illa farin og verður væntandi vrak. Løgrelgan hevur illgruna um, at ov nógv ferð er orsøkin til óhappið.




Viðfestisvognur
TILBOÐ



v/seyðarimum, næsahjóli og **skráseting.**
Stødd 120 x 205 x 30 - 500 kg.
**einans 8.995,-**
Fáast eisini hjá Balslev,
Klaksvíkar Timburhandli og D.J. Enni
HANSEN · tel 447142 - 218540

Sosialurin 341800

**Lýsing**

**um ferðslu á Jóansøku á Tvøroyri tann 27., 28. og 29. juni 2003.**

1. Meðan kappróðurin fer fram, er øll óviðkomandi sigling á kappróðrarøkinum bannað. Somuleiðis er frá hálvum tíma áðrenn kappróðurin byrjar og til hesin er av, øll akferðsla bannað á kajøkinum.

2. Í samband við barnasúkklukapping, ið verður á Ovara veg leygardagin 28. juni kl. 12.30, verður heitt á allar bilførarar um at vísa ans og fylgja teimum boðum, ið verða givin á staðnum.

3. Meðan jóansøkan verður sett leygardagin 28. juni frá kl. 13.45 til 14.30 er koyring ikki loyvd frá Uttara handli vestur til Posthúsið.

4. Leygardagin 28. juni í tíðarbilinum frá kl. 17.30 til kl. 20.00, er parkering í báðum síðum bannað frá Kirkjubrekkuni út á Torvheygg.

**Tvøroyrar Býráð**

Sosialurin 341800



Koyrikortsskeið til
lastbil, trailara og buss
byrjar mánadagin 30. juni kl. 19.30

**Føroya Koyriskúli**

v/ **John Christiansen**, koyrilærari
Suðuroyarvegur 11 • FO-100 Tórshavn • Tel 21 47 75

SISERO 351800



**Til sølu**

Um hóskandi boð fæst, verður ognin Tróndargøta 35 í Havn seld.

Nærri fæst at vita á **tlf. 312234 - 512234**

Student í Hoydølum '93?



Melda teg til jubilæums-veitsluna NÚ!

Hanus (45) 22 64 23 44
Marjun (45) 22 34 36 98
Janus (45) 60 92 02 04
Guri (45) 22 89 56 89

Les meira:
http://reinert.starthotel.dk/veitsla

Sosialurin 341800

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Útbjóðing**

Við hesum verður vegarbeiðið við Óðinshædd boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um gerð av 10 m breiðum vegi við tilhoyrandi installatiónum, samlað longd uml. 140 m.

Bílegging av útbjóðingartilfarinum, móti einum veðhaldi uppá kr. 2.000,00 til Tórshavnar kommunu, fer fram á Snarskivuni í seinasta lagi mánadagin 7. juli 2003 kl. 16.00.

Licitatiónin verður 17. juli 2003.

Tórshavnar kommuna
Tlf. 31 51 60
e-mail torshavn@torshavn.fo

SNARSKIVAN

Sosialurin 341800

**Kunngerð**

Føstu fundardagar býráðsins seinra hálvár í 2003 verða:

3. juli | 1. september
6. oktober | 3. november
1. desember

Allir fundirnir verða kl. 17.00 í býráðssalinum og ikki sum áður lýst kl. 19.00.

**Tvøroyrar Býráð**

**Feriuavloysari**

við tí stóra koyrikortinum, søkist at byrja beinanvegin.

Restorffs

tel 21 97 28

Sosialurin 341800

Rør&Blikk

**RØR & BLIKKSMIÐUR**

Søkt verður eftir rørsmiði, blikksmiði ella fólki við royndum innan HVS arbeiði, at byrja beinanvegin.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn,
tel 322 999 fartel 225 345
www.rorblikk.fo

Sosialurin 341800

**Aðalfundurin**

hjá Miðvágs Róðrarfelag er útsettur vegna fráfall.

Nærri verður lýst seinni.

**Nevndin**

www.sosialurin.fo